# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Ráðstevna um javnvág millum arbeiðslív og familjulívið

**Fríggjadagin skipar Vinnumálaráðið fyri ráðstevnu í Norðurlandahúsinum um møguleikar fyri betri javnvág millum arbeiðslív og familju- og frítíðarlív**

RÁÐSTEVNA
*Tíðindaskriv*

Á almennari ráðstevnu í Norðurlandahúsinum komandi fríggjadag kl. 14.00 til 16.30 verður ljós varpað á spurningin um, h***vussu vit fáa vit betri javnvág millum arbeiðs- og familjulívið.***

Vaksandi krøvini til tann einstaka á arbeiðsmarknaðinum gera, at traditionella lívsmynstrið á mangan hátt er í broyting, ja kanska hótt. Hesi viðurskifti ávirka familjumynstrið og gera, at vaksandi ynski er um at skipa síni heimligu viðurskiftini soleiðis, at betur samsvar verður millum arbeiðs- og familjulívið. Hesi viðurskifti fara at seta stór krøv til allar partar av føroyska samfelagnum.

Í sambandi við tær broytingar, sum eru á arbeiðsmarknaðinum, verður mett, at ávís tiltøk eiga at verða sett í verk fyri at laga arbeiðsmarknaðin og familjulívið til broyttu umstøðurnar. Fyri at fremja góðu javnvágina millum arbeiðs- og familjulívið er týdningarmikið, at samfelagið er skipað liðiligt og rúmligt, soleiðis at familjan og hin einstaki hava møguleika at skipa síni viðurskifti á bestan hátt. Hetta er neyðugt fyri at røkka vælskipaða og produktiva samfelagnum, har atlit verða tikin at tí parti av lívinum, sum hoyrir familjuni og tí einstaka til.

Áðrenn slík arbeiðsmarknaðarlig tiltøk kunnu verða sett í verk er tó neyðugt, at øll viðurskifti, sum hava týdning fyri javnvágina millum arbeiðslív og familjulív, verða gjølla lýst.

Fyri at røkka hesum endamáli hevur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í arbeiðsmarknaðarmálum, sett eina kommissión, sum skal lýsa tey krøv, sum bæði arbeiðsmarknaður og familjur væntandi fara at seta samfelagnum í framtíðini, herundir krøvini til ein liðiligan arbeiðsmarknað og liðiligari almennar og privatar tænastur. Ætlandi verður arbeiðið skipað soleiðis, at kommissiónini heldur fundir, har ymsar hagtalskanningar, viðgerð av upplýsingum, kjak o.a. er á skránni. Vinnumálaráðið, ið skal virka sum skrivari hjá kommissiónini, fyrireikar hesar fundir. Roknað verður við, at kommissiónin hevur ein fund um mánaðin, tilsamans 10 fundir árliga. Arbeiðið skal vera liðugt til ársskiftið 2008/09. Yvirlit yvir limirnar í arbeiðsmarknaðarkommissiónini er hjálagt.

Á ráðstevnuni fara Linda Nielsen, professor dr. jur. í familju- og arvarætti á Københavns Universiteti og formaður í donsku Familie- og Arbejdslivskommissionen, Kristine Stricker Hestbech, sóknarprestur, fyrilestrahaldari og eisini limur í donsku kommissiónini, og Hege Storhaug, journalistur, rithøvundur og kunningarleiðari hjá *Human Rigths Service*, Noreg, at luttaka við framløgum og fyrilestrum. Ráðstevnan verður hildin 21. september 2007 kl. 14 til 16.30 í Norðurlandahúsinum

## Yvirlit yvir limir í Kommissiónini

**Jóan Pauli Joensen**, fólkalívsfrøðingur, rektari á Fróðskaparsetri Føroya, Tórshavn *(Formaður)*
**Lis Mortensen**, forkvinna í felagnum *"Heim og skúli"*, Hoyvík
**Jógvan Fríðriksson**, sóknarprestur, Innan Glyvur
**Barbara Vang**, løgfrøðingur, Tórshavn
**Bergtóra Høgnadóttir Joensen**, sosialráðgevi og HR-mennari, Argir
**Gissur Patursson**, stjóri, Tórshavn
**Jógvan Zachariassen**, samkomuleiðari, Hoyvík
**Kalpana Vijayavarathan**, lærari á Føroya Handilsskúla, Tórshavn
**Katrin Dahl**, sjúkrarøktarfrøðingur og fyrrverandi leiðari á hvíldarheiminum Naina, Hoyvík
**Jákup Danielsen**, sølustjóri á Føroya Tele, Tórshavn
**Søren L. Bruhn**, stjóri í Suðuroyar Sparikassa, Tvøroyri
**Rósely Reynstind**, dagrøktarleiðari, Miðvágur
**Jancy Olsen**, skrivstovukvinna, Toftir
**Sámal Matras Kristiansen**, sosiologur, Hvalvík
**Rigmor Dam**, lærari og journalistur, Tórshavn




# Teir rokast á sildafeltinum



*Christian í Grótinum*

FISKISKAPUR

Christian í Grótinum er á veg til Noregs við 700 tonsum, og Norðborg trolar saman við 50 skipum innan fyri 30 fjórðingar.

Eftir at tað seinastu vikuna hevur verið smáligt hjá sildaskipunum norðanfyri, hilnaðist vikuskiftið heilt væl. Christian í Grótinum er á veg til Noregs við 700 tonsum av feskari sild. Fyrstu vikuna partrolaðu teir saman við Carlton, og síðani hava teir trolað saman við Norðborg. Fiskaríið var fyrra partin av túrinum smáligt. Í vikuskiftinum hava teir rokast. Christian í Grótinum roknar við at vera inni í Måløy í Noregi í dag.

Norðborg fór nýggjan túr 31. august. Eftir at Christian í Grótinum er farin at sigla til Noregs, trolar Norðborg við lemmum.

Norðborg hevur verksmiðju, og teir høvdu í dag 600 tons av frystum sildafløkum í lastini. Á heimasíðuni hjá Christian í Grótinum siga teir á Norðborg, at tað skrivar, og at tað eru nógv skip, sum trola á einum ógvuliga avmarkaðum øki. Teir hava talt eini hálvt hundrað skip innan fyri 50 fjórðingar. Talan er um íslendsk, russisk og grønlendsk skip umframt føroysku skipini.

Fríggjadagin landaði Jupiter 450 tons av feskari sild til matna í Vaerøy í Noregi. Finnur Fríði og Tróndur í Gøtu partrola.